## Viðmerkingar:

# Onki verður sum tað hevur verið



Nú Anfinn, løgmaður og Høgni, varðaløgmaður eru so altráðir eftir at stovnseta fullveldi Føroyar, uttan greitt at siga, hvørjar avleiðingar hetta inniber fyri føroysku familjuna, er tað gleðiligt, at aðrir skribentar gera vart við seg. Millum aðrar hava Kári Petersen, búskaparfrøðingur og Petur H. Dahl sjómansskúlalærari, tikið til orðana, og víst á realitetirnar, nú vit eru innanfyri ríkiskarmarnar, og tá vit - sum vónandi ikki hendir - verða uttanfyri.

Allir føroyingar vita — ella áttu at vita — at vit hava eina einstáttaða høvuðsvinnu, fiski- og alivinnuna, sum vit ikki eru harrar yvir, hvørki hvat nøgd ella prísum viðvíkur. Henda vinna stóð fyri 98% av útflutningsvirðinum í 1999.

Út frá hesum mugu vit ásanna, at vit hava ein óstabilan og viðkvæman búskap at byggja okkara tilveru á.

Ongin ivi skal tí vera um, at loysa vit frá hinum partinum av ríkinum, so gerast karmarnir trengri. Livikorini versna, og íløgur torir eingin at gera, - hvørki alment ella privat. Vit fáa arbeiðsloysi, og eitt munandi hægri skattatrýst, sum aftur vil føra til eina fólkafráflyting, sum ikki kann samanberast við tað, sum hendi fyrst í 90-unum.

Sambandsflokkurin hevur víst til eitt nýskipanaruppskot, har Føroyar gerast meira búskaparliga sjálvbjargnar og fáa størri politiskan avgerðarrætt.

Tá hetta kann gerast innan fyri verandi ríkisrættarligu støðu, er onki sum rættvísger, at landsstýrið við sínum fullveldisætlanum, tekur grundarlagið undan dagligu tilveru føroyinga, og harvið undirmetir týdningin av tí samveru sum er millum londini bæði.

Filosofisku- og partvís bestiltu útgreiningarnar hjá landsstýrinum um, at alt verður sum tað altíð hevur verið tá loysingin er framd, er heilasjúkt møsn.

Útgangsstøðið hjá landsstýrinum er loysing her og nú. Tá onki annað verður góðtikið, kenna vit fylgjurnar, og tí hevði verið rættast, at Føroya fólk longu nú fekk høvið til at taka støðu fyri ella ímóti fullveldisætlan landsstýrisins.

**Flemming Mikkelsen**
**løgtingsmaður**

# Vinnarar í sangkapping verða heiðraðir í dag

*Sangkappingin »Vælskapt brek« er nú komin so langt, at vinnararnir eru funnir. Í dag kl. 17 verður samkoma í Norðurlandahúsinum, har bestu sangirnir verða heiðraðir*

Fyri hálvumtriðja mánaði tóku nøkur fólk saman við Føroya Lívstrygging stig til eina sangkapping, sum skal seta sjóneykuna á brekað í Føroyum og teirra avvarðandi.

Sangkappingin hevði til endamáls at útvega sang- og tónleikatilfar, sum skal brúkast til fløguútgávu seinni í summar.

Tá freistin var úti fyri góðum mánaði síðani, vísti undirtøkan seg at hava verið nógv størri, enn nakar hevði roknað við.

Næstan 80 sangir, løg og yrkingar komu inn til kappingina, so dómsnevndin hevur havt úr gjørt við at funnið fram til vinnararnar.

Seinnapartin í dag, kl. 17.00, verður samkoma í Norðurlandahúsinum, har tríggir teir bestu av innkomnu sangunum fáa virðislønir og skreytblað. Fyri at skapa ein hugnaligan karm rundan um samkomuna, fara Johannes Andreasen og Sámal Petersen at spæla klaver og violin, og eisini verða sangarar úr Tórshavnar Manskóri at hoyra.

Samkoman er almenn, og aftan á handanina verður ein drekkamunnur at fáa.

# Kvinnur og vald

Í juni mánaði skipaði Útnorðurráðið fyri ráðstevnu í Havn undir heitinum: “Kvinnupolitiskur verkstaður”.

Ráðstevnan endaði við einum almennum fundi, har m. a. umboð fyri bólkar, sum høvdu arbeitt við ávísum evnum, løgdu úrslitini úr arbeiðsbólkunum fram.

Ein av arbeiðsbólkunum hevði arbeitt við spurninginum um kvinnur í politikki. Marita Petersen, fyrrverandi løgmaður hevði sitið í hesum bólki og legði vegna hann niðustøðunar í bólkinum fram. Ein niðurstøða var, at í útnoðrið átti at verða miðja eftir at broyta vallógirnar til lóggevandi tingini soleiðis, at uppstillingin gerst kynskvoterað. Bólkurin helt tó hesa niðurstøðu vera rættiliga kontroversiella.

Beint frammanundan høvdu umboð fyri landdagin í Kiel vitja løgtingið. Í tinginum spurdi ein av limunum, hvussu tað bar til, at kvinnurnar eru so illa umboðar á tingi, og fingu vit frá teimum at vita, at í Schleswig-Holsteinska landdegnum eru 75 limur og av teimum eru 29 kvinnur, tað eru 39%.

Í løgtinginum eru 4 kvinnur ella 12,5%.

Eg fór síðan at kanna hvussu umboðanin hjá kvinnum er í tingunum kring okkum. Í Altinginum eru 21 kvinnur ella 33%, í grønlendska Landstinginum eru 6 kvinnur ella 19%, í álendska Løgtinginum eru 7 kvinnur ella 28% , í Fólkatinginum eru 59 kvinnur ella 31%, í svenska Ríkisdegnum eru 43 % kvinnur, í norska Stórtinginum eru 60 kvinnur ella 36% og finska Ríksidagnum eru 73 kvinnur ella 37%.

Somuleiðis eru kvinnurnar betur umboðaðar í stjórnunum í hinum Norðanlondunum enn í Føroyur. Í Svøríki 50%, í Ísland 25%, í Danmark.góð 33% (7 av 20), í Noreg 42% (8 av 19), í Finlandi 44%(8 av 18). Sjálvstýrandi økini Føroyar, Grønland og Áland hava øll bert eina kvinnu í landsstýrinum.

Hetta saman við øðrum fekk meg at hugsa um, hvussu lítið vald ella ávirkan kvinnur í Føroyum hava í polikki ella har avgerðirnar verða tiknar. Hetta hóast at føroyskar kvinnur eru minst líka vælútbúnar sum menninir, og er kvinnuparturin á arbeiðsmarknaðinum góð 44%. Men tó, tá hugsað verður um ta mótstøðu, sum kemur til sjóndar bæði á tingi og í fjølmiðlunum, tá mál er frammi, sum snúgva seg um at styrkja støðuna hjá kvinnuni í samfelagnum, er hetta ikki so løgi Sum dømi kunnu nevnast orðaskiftið í sambandi við javnstøðulógina, málið um nevndarval og javnstøðu og seinast orðaskiftið um tilráðingarnar frá útnorðurráðnum. Prestastríðið, skattalógin og samgonguskjalið bera eisini øll boð um, at konufólkini skulu fastlæsast í verandi støðu ella kanska enn betur, at støða teirra verður, sum hon var fyri 50 til 100 árum síðani.

Tað, sum serliga undrar meg, er, at hesin hugburður sleppur at liva víðari í eini tíð sum okkara. Vit standa á gáttini til informatiónssamfelagið ella hava kanska longu fingið annan fótin innum. Eisini verður tosað um at skapa vinnur, sum kunnu verða alternativ til fiskivinnuna, og verður tá serliga hugsað vinnur, sum krevja dýra og vælútbúna arbeiðsmegi, har vøddamegin ikki hevur so nógv at týða.

Føroyska arbeiðsmegin er avmarkað, so um politiski málsetningurin um fáa konufólkini heimaftur skal vinna frama, so mugu okkara ráðandi viðurkenna, at um hin málsetningurin eisini skal vinna frama, mugu vit innflyta fremmanda arbeiðsmegi, og taka teir avleiðingar, sum tað hevur fyri samfelagið.

Sjálv haldi eg, at uppskotið hjá bólkinum “kvinnur í politikki” er eitt frálíkt hugskot, tí tað ber boð um, at hesar kvinnur hava viðurkent, at okkurt radikalt eigur at verða gjørt, og tað sum gerast skal mugu kvinnurnar sjálvar taka stig til, tí tey (les teir), sum sita har avgerðirnar verða tiknar, fara ikki uttan víðara at lata onnur(les aðrar) sleppa upp í part. Eg haldi tó, at vit eiga at umhugsað at fara enn eitt stig víðari í hesari stremban okkara.

Í hesum døgum verður arbeitt við grundlóg fyri Føroyar. Nevnd er sett at gera uppskot til grundlóg eftir arbeiðssetningi, sum við heimild í lógini um grundlógarnevnd, er ásettur av landsstýrismanninum í lógar- og fullveldismálum. Í arbeiðssetinginum eru ymsu tættirnir í eini grundlóg nevndir, og er m.a. javnrættur nevndur í præamblinum soleiðis:

”Nevndin eigur at viðgera og taka støðu til, um ein inngangur skal vera, ið staðfestir endamálsorðingar fyri føroysku samfelagsskipanina og leiklut Føroya í altjóða høpi. Metast má um, hvørt orðingar skulu gerast um, at fólk og myndugleikar skulu stremba eftir til dømis:

Frælsi, fólkaræði, javnrætti, friði, samvinnu, rættartrygd, felags skyldum og ábyrgd”.

Onki verður nevnt um talan er um javnrætt millum kynini ella javnrætt í víðari merking, men haldi eg, tað hevði verði áhugavert at fingið spurningin um javnrætt millum kynini og eina



møguliga grundlógarásetting um kynskvotering í løgtinginum við í viðgerðina av grundlógini.

Eg eri fullvæl greið yvi , at fyrsta reaktiónin er uppá ein slíkan tanka er, at hetta ikki hoyrir heima í eini grundlóg, men tí eri eg ikki samd í.

Ein grundlóg í traditionellari merking ásetur rættindi og skyldur borgaranna í samfelganum, men sanniliga eisini karmarnar fyri valdinum ella ávirkanini í samfelagnum.

Okkara upprunaliga grundlóg er danska grundlógin frá 1849. Tá hon kom í gildi 5. juni 1849 varð valdið flutt frá tí einavelduga konginum til fólkið, men hvat var fólkið.

Konufólk vóru ikki fólk í hesari merking, tí tey fingu ikki valrætt. Valrættaraldur varð settur til 35 ár, og verður lági miðallivialdur tá á døgum havdur í huga, so var tað stórur partur av monnunum, sum heldur ikki fekk valrætt. Ognarleys, revsaði og skuldarar høvdu ikki valrætt. Samanumtikið kann sigast, at talið av teimum við valrætti ikki var stórt.

Hetta broyttist spakuliga. Konufólkini fingu valrætt í 1915 og um sama mundi kom valrættaraldurin niður á 21 ár.

Við at hyggja eftir gongdini serliga frá 1849 til 1915, so hendu hesar broytingar ikki av sær sjálvum. Tí uttan mun til um tú ert einavaldskongur ella ein útvaldur skari av “rigets bedste mænd”, so letur man ikki av fríum vilja vald frá sær, heldur ikki til kvinnur og ognarleys. At fáa kvinnum valrætt, kostaði sum kunnugt serliga bretsku sufragettunum blóð, sveitta og tár.

Mótstøðan móti javnstøðulóg og mótstøðan móti kvinnuligum prestum eru bæði dømi um tað sama, nevniliga ein roynd hjá teimum, sum sita við valdinum at varðveita tað. Sama ger seg galdandi, tá ført verður fram, at tað er javnstøða millum kynini, at kvinnurnar ikki eru áhugaðar í politikki ella sum tað sum verður ført fram, tá øll hini argumentini eru brúkt: “Tað er vanvirðisligt fyri kvinnuna”.

Tað eru tí kvinnurnar sjálvar, sum mugu gera eitt miðvíst arbeiði til tess at fáa tað vald í politiska umhvørvinum, sum tilkemur teimum. Ikki fyrrenn hetta er veruleiki fáa tey virðini, sum vanliga verða nevnd tey kvinnuligu ella bleytu virðini tann prioritet, tey hava uppiborið.

Eg vil gera vart við, at tá eg tosi um javnrætt, tosi eg um **rætt** og ikki um, at menn og konur, gentur og dreingir skulu vera líka, tí tað eru tey ikki. Eg tosi um javnbjóðis viðurskifti millum kynini, sum virðir teir munir, sum frá skaparans hond eru millum mann og kvinnu bæði likamliga og sálarliga. Tað er ikki hugsan mín at kvinnur skulu vera sum Annie í Annie get your gun, sum sang: “Everything you can do I can do better”, men at vit í felag gera tað, sum gerast skal. Tað, sum skal broytast, er hugburðurin um, at traditionelt mannafólkaarbeiði er meira vert enn traditionelt kvinnuarbeiði. Hesum náa vit ikki uttan bæði kynini eru meira javnbjóðis umboðaði, har ávirkanin og valdið er, og at tað verða sett eins stór ella smá krøv til tær kvinnur sum koma framat, sum til menninar. Í stuttum, at tað verður tikið eins natúrligt, at ein flakakvinna av Eiði ella húsmóðir úr Sørvági verður tingkvinna sum tað er, tá ein fiskimaður úr Vági ella lærari av Sandi verður valdur á ting.

Niðurstøðan er í stutttum tann, at miðjast má eftir at fáa javnstøðuspurningurin á dagsskrá hjá grundarlógarnevndini herundir spurningin um kynskvotering í løgtinginum. Uttan mun til hvat lagnu grundlógararbeiðið fær, so fer orðaskiftið at føra við sær, at spuringurin verður gjølla viðgjørdur. Hetta fer at flyta nøkur mørk ella bróta niður nakrar garðar á hesum øki, kanska so mikið, at tað ikki verður mett kontroversielt at taka táttin upp í vallógini..

Í minsta lagi vóni eg, at eitt slíkt orðaskiftið kann gera fleiri kvinnur varugar við henda spuring og at bæði kyn kunnu fáa eina fatan av, at málið ikki snýr seg um at vera ímóti kallkyni ella Várharra, men hinvegin opnar møguleikar fyri einum samfelag, har øll kunnu trívast og mennast eftir evnum og førleika.

**Súsanna Danielsen**



# Í býin - altíð eitt stað at fara


Streymoy

Kaggin
MOON-SHOT
spæla til dans fríggja- og leygarkvøldið
Kaggin
www.kaggin.fo
Sosialurin - 311820

HAVNAR KLUBBI Stovnaður 1799
KLUBBADANSUR
Leygarkvøldið spælir
Bacon

SKAR‹HAMAR´S BUSSKOYRING
v/ He›in Skar›hamar, Sleipnisgøta 13. B, FO–100 Tórshavn
TAXA
MINI BUSS TIL 10 FER‹ANDI
288888
FR • VISA • EUROCARD • MASTERCARD • JCBCARD

Long drinks Café
CLEOPATRA
Við gongugøtuna
Opið er:
Mán.– Hós. kl. 19.00 – 23.30
Fríggjadag kl. 17.00 – 03.30
Leygardag kl. 19.00 – 03.30
Sunnudag kl. 17.00 – 23.30

AUTO
- Dag sum nátt -
- skjótt og gott -
Skalt tú bil hýra - so er tað 311234
AUTO
BENZIN DIESEL KIOSK - ALT DØGNIÐ -
AUTO 311234

Hóskvøldið og sunnukvøldið
EIVØR PÁLSDÓTTIR KVARTETT spælir
Double up við páskabryggj verður kl. 21-22
CAFÉ NATÚR
Sosialurin - 311820

NÁTT-BUSSURIN
hjá Øssuri Christiansen
Fríggjakvøldið:
Úr Vestmanna kl. 21
Úr Tórshavn kl. 22
um Kvívík og Kollafjørð.
Suður eftir konsertina
Leygarkvøldið:
• Úr Vestmanna kl. 22
• Úr Tórshavn kl. 23
• Úr Vestmanna kl. 24
• Úr Tórshavn kl. 01
• Úr Vestmanna kl. 04
• Úr Tórshavn kl. 05
um Kvívík og Kollafjørð
Tlf. 424254
Bussarnir:
Tlf. 287752 • 286254

sosialurin
www.sosialurin.fo

fk Matseðilin
Hósdagin 4. mai: Høsnarungar
Fríggjadagin 5. mai: Kotelettir
Leygardagin 6. mai: Oksasteik
Mánadagin 8. mai: Kjøtbollar í karrysós
Týsdagin 9. mai: Stoktur fiskur
Mikudagin 10. mai: Hakkibúffur
Kostnaður 30,- kr.
***
Seinnaparts-TILBOÐ
frá kl. 14.00:
Juniorburgari 14,95
Maxiburgari ella
Búffsandwich 19,95
Matstovan í Hoyvík

VESTMANNA ÍTRÓTTARHØLL
Stór Gospelkonsert
verður fríggjakvøldið 5. mai kl. 22.30







Kostnaður kr. 100,-
Tey sum luttaka eru: *Magni Christiansen, Rachel Bærentsen, Hans Jákup og vinfólk*
Stórur dansur
verður leygarkvøldið 6. mai kl. 23.00-03.30
Kostnaður kr. 100,-
TWILIGHT spælir til dansin
Restaurant la Carreta er opin til kl. 22.00
við einum góðum tilboði til tín sum vil njóta ein góðan bita áðrenn konsertina ella dansin.
Piparbúffur..................kr. 100,-
Oksasteik v/bernaisesós og salat............................kr. 80,-
La Carreta RESTAURANT
Vinarliga bíleggið borð á tel. 424610
Náttbússurin koyrir
Fríggjakvøldið kl. 22.00
Tórshavn-Kollafjørður-Kvívík-Vestmanna og aftur tá ið konsertin er liðug.
Leygarkvøldið kl. 23.00
Tórshavn-Kollafjørður-Kvívík-Vestmanna
Kl. 04.00 Vestmanna-Kvívík-Kollafjørður-Tórshavn
UNGTEMPLARAFELAGIÐ HEYGGUR
Sosialurin - 311820

Nor›oyggjar

Klaksvíkar Klubbi
Dansur við plátuvendara verður leygarkvøldið 6. mai
Klubbin hevur: POOLBORÐ BILLARDBORÐ ENSKAN FÓTBÓLT Á SKY
Sosialurin - 311820

Í BÝIN
Fylgið við hvat hendir kring oyggjarnar í vikuskiftinum
sosialurin